Tórshavnar býráð tíðindafund:

# Umfatandi broytingar fyri skúlarnar



*Hesin bygningurin hjá Postverkið Føroya skalnýtast til skúla á Argjum, um alt gongur eftir ætlan.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tórshavnar býráð hevur sett út í kortið eina longri røð av ætlanum, sum fara at betra um støðið á skúlunum í høvuðsstaðnum. Talan er um eina sera kostnaðarmikla verkætlan, men býráðið hevur valt at raðfesta hetta ovarliga. Eisini frítíðarskúlarnir fáa eina bøtandi hond**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
*Heri á Rógvi*

Á býráðsfundi hóskvøldið var m.a. ein fyrispurninguri frá Leivi Hansen, býráðslimi og fyrrverandi borgarstjóra, um ætlarnirnar við skúlaverkinum. Spurningurin ljóðaði stutt og greitt: Nær hendir nakað á skúlaøkinum.

Borgarstjórin, Jan Christiansen, heldur, at Leivur Hansen átti heldur at spurt seg sjálvan, hví einki henda ta tíð, ið hann var borgarstjóri (1996-2000).

Jan Christiansen sigur, at sum ein avleiðing av fólkavøkstrinunm er og verður neyðugt at byggja út skúlaverkið í kommununi, ikki einans nýggjar skúlaeindir í nýggju íbúðarøkjunum, men eisini at víðka og umbyggja verandi.

Jan Christiansen vísir á, at seinastu fimm árini hevur ein vøkstur áljóðandi 600 næmingar verið í skúlanum í Tórshavnar Kommunu. Við hesum eru Adventistaskúlin og Kollafjarða Skúli ikki íroknaðir.

Arbeiðsbólkar við umboðum av politiska pallinum, skúlaleiðslum, byggikønum og øðrum eru settar at kanna, hvørji stig eiga at verða tikin. Úrsltið av fyrireikandi arbeiðinum er ein nágreinilig ætlan við øllum skúlunum.

Fyri at nevna dømi, so kunnu vit taka Argja Skúla burtur úr rúgvuni. Har er ætlanin hjá Tórshavnar Kommunu at ogna sær bygningin hjá Postverkið Føroya á Argjum, ið hýsir Frímerkjadeildini og Girostovuni.

Jan Christiansen sigur, at teir hava víst áhuga fyri at keypa, og ein handil er ikki so langt vekk, tí talan er um, at Postverkið skal eitt nýtt øki at byggja við gamla Idé húsið, har postverkið heldur til. Borgarstjórin leggur aftur,at húsið hjá postverkinum eru sum skapt til endamálið og vil loysa trupulleikan endaliga.

Skúlin í Hoyvík og Kommunuskúlin skulu báðir hava nýbyggingar. Hoyvíkar skúli skal hava tríggjar nýggjar stovur. Kommunuskúlin skal gera ein heilt nýggjan bygning, har gamla barakkin stendur.

### Frítíðarskúlin

Eisini frítíðar skúlin og barnagarðsbørnini fáa meira pláss eftir ætlanini hjá býráðnum. Í løtuni standa 300 børn á bíðilistanum hjá Tórshavnar býráð til at fáa eitt ansingarpláss. Í løtuni verður arbeitt við tvær ferðir 60 ansingarplássum. Býráðið samtyki eisini einmælt fyri afturlatnum hurðum at keypa eina grund á Argjum, sum liggur við Sandá – aftanfyri gomlu hølini hjá Dagblaðnum. Talan er um eitt makaskifti, har eigarin fær onnur byggilendi afturfyri.

Hølini, sum higartil bert er ein grund, skulu nýtast til barnagarð til 60 børn og til frítíðarskúla, sum áður hevur hildið til í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum.

Býráðið hevur harafturat samtykt at keypa eini sethús, sum standa í Stoffalág 82, til frítíðarskúla .

Húsini kosta býráðnum 4 mió kr. at keypa, men borgarstjórin letur væl at kortini, tí talan er um permanenta loysn, og húsið lúka øll krøv. Keypið er tó treyta av, at øll loyvi eru komin upp á pláss, og hetta merkir eisini, at grannarnir sleppa at siga sítt um málið.

Sum heild mynda skúlar, frítíðarskúla og ansingarstovnar nógv tann størsti partin av komandi íløgum hjá Tórshavnar Kommunu.




Føroya Banki kann sum einasti peningastovnur í Føroyum bjóða tær trý ymisk lán til sethúsabygging ella -keyp. Hetta ger, at tú sjálv/ur kanst velja, hvat lán hóskar best til tín og tína fíggjarstøðu:

**FastLán** - lánið, har rentan verður læst føst í eitt 10-ára skeið. Við FastLáni ber altíð til at hava greiðu á, hvussu nógv skal gjaldast hvønn mánað.

**Rentuloft** - lánið, har til ber at hava skiftandi rentu, samstundis sum trygd fæst fyri, at rentan ikki fer upp um eitt ásett rentuloft tey næstu 7 árini.

**Búlán** - vælkenda lánið við skiftandi rentu, ið verður ásett á fíggjarmarknaðinum.

Um tú vilt hava gjøllari upplýsingar um lánimøguleikarnar í Føroya Banka, ert tú vælkomin at seta teg í samband við starvsfólk bankans.

FØROYA BANKI



# Samferðslan má ganga sína gongd í verkfalli

**Kommunusamskipan Føroya hevur viðgjørt trupulleikarnar sum ofta stinga seg upp á samferðsluøkinum, tá ið verkfall er**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Samferðslan eigur ikki at vera løgd lamin, tá ið ósemjur taka seg upp á arbeiðsmarknaðinum.

Tað heldur Kommunusamskipan Føroya.

KSF hevur viðgjørt spurningin um samferðsluviðurskiftini í sambandi við ósemjur á arbeiðsmarknaðinum.

Og í skrivi, sum nú er sent avvarðandi pørtum á arbeiðsmarknaðinum, eitt nú fakfeløgunum, landsstýrinum o.ø, verður heitt á partarnar um at finna loysnir so at samferðslan kann ganga ótarnað, hóast verkfall er.

Í brævinum, sum Jógvan Krosslá, stýrisformaður og Jens Marius Poulsen, starvsbólkaformaður, hava skrivað undir, verður sagt, at Kommunusamskipan Føroya harmast um, at hvørja ferð verkfall ella onnur slík viðurskifti taka seg upp, verða tey, sum bert hava sjóvegis farleiðirat líta á, hart rakt av hesum.

– Serliga eru tað oyggjarnar longst frá samanbundnað miðøkinum, ið eru fyri stórum missi, bæði fíggjarliga, mentanarliga og samfelagsliga, sigur KSF.



*– At ósemjur á arbeiðsmarknaðinum leggja samferðsluna lamna, er so dýrt fyri vinnulívið úti um landið at tað dettur niðurfyri ella flytir sítt virksemið inn á samanbundnað miðøkið, sigur Kommunusamskipan Føroya. Her er eitt dømi: Dúgvan liggur á gomlu kei á Tvøroyri, seinast verkfall var*

### Stórur missur

Felagið sigur, at fíggjarligi missurin kemst m.a. av, at møguleikin fyri at røkja sítt arbeiði verður skert mundandi, bæði tí at ikki ber til at koma ímillum bústað og arbeiðspláss og at rávøra og onnur vøra ikki frítt kann flytast millum oyggjarnar.

– Hetta hevur eisini við sær, at vinnulívið á staðnum fær eitt slíkt bakkast, at tað dettur niðurfyri ella heldur ger av at flyta sítt virksemi inn á samanbundnað miðøkið.

KSF sigur eisini, at mentanarliga hevur tað við sær, at fólkið á hesum støðum als ikki hava nakran møguleika at luttaka í nøkrum tiltøkum, ið liggja uttanfyri teirra økið.

– Samfelagsliga hevur ger tað, at hesi fólk verða sett uttanfyri alla ávirkan í samfelagnum afturímóti teimum, sum búgva í samanbundnað miðøkinum.

– Kommunusamskipan Føroya heitir tí á avvarðandi partar, sum hava avgerðandi týdning fyri samferðsluna, herundir landsmyndugleikar, fakfeløg o.o., um at virka fyri, at ósemjur og líknandi ímillum partar ikki føra við sær, at samferðslan verður hótt soleiðis, at sambindingarliðini ella landsvegakervið verður rakt av blokadum v.m. sigur KSF.

# Fáa brúk fyri níggju milliónum afturat í ár

**Strandferðslan fær brúk fyri stórari eykajáttan fyri at fáa ráð til at leiga hóskandi avloysaraskip fyri Smyril í vetur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Sum er, fer ikki at bera til hjá Smyrli at flyta tungan flutning í vetur, tí má Strandferðslan fáa annað skip og BjarniDjurholm mælir til, at neyðuga játtanin verður latin til endamálið*

Skal Strandferðslan fáa ráð til at leiga avloysaraskip fyri Smyril í vetur, má hon fáa eina eykajáttan upp á umleið níggu milliónir í ár.

Stabilisatorararnir á Smyrli virka ikki sum teir skulu, men fyri at kunna flyta tungan flutning í ringum veðri í vetur, er tað ein treyt, at teir verða gjørur aftur. Men av tí, at Smyril er so gamal, skulu eykalutirnir gerast serstakt til Smyril, og tí verður Smyril lagdur í september ella oktober og verður ikki í sigling aftur, fyrenn í februar ella mars, soleiðis sum útlitini nú eru.

Skal flutningurin til Suðuroyar í vetur varðveitast á sama støði sum nú, verður tað tískil neyðugt hjá Strandferðsluni at leiga skip í allan vetur.

Men fyri at fáa ráð til tað, krevst ein eykajáttan

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslu, sigur, at ein meting vísir, at Strandferðslan fer at fáa brúk fyri umleið níggju milliónum afturat í ár, skal hon hava pening til at leiga eitt skip fyri, sum er minst á sama støði sum Smyril, samstundis sum umvælingarnar verða gjørdar á Smyrli.

Harafturat verður brúk fyri eini játtan næsta ár, men hon verður minni.

Men hann vísir samstundis á, at tølini skulu takast við største varsemi, tí hendan upphæddin er ásett fyri at binda um heilan fingur.

– Leitað verður eftir eykalutum og tað kann vera, at tað hepnast at finna teir, so at tað ikki verður neyðugt at gera teir og so verður leveringstíðin mundandi stytri.

Tað skilst kortini, at sannlíkindini fyri tí, eru ikki serliga stór.

Men skuldi tað eydnast, kann umvælingin fáast frá hondini skjótari.

Tað kann eisini vera, at tað verður bíligari at leiga eitt skip, enn mett.

Gongur tað tískil eftir vild, verður rokningin ikki so stór.

Bjarni Djurholm sigur, at hansara tilmæli er, at sambandið ímillum Suðuroynna og Havnina ikki skal vera verri enn taðå er nú, hvørki hvat viðvíkur umstøðunum hjá ferðafólki, ella møguleikunum fyri at flyta tungan flutning.

Tí fer hann at mæla Landsstýrinum til at játta neyðuga peningin og so vónar hann, at tað fer at eydnast Strandferðsluni at finna tað rætta skipið.

# Bjargaðu bátunum í evstu løtu

**Tað um reppið, at brimið ikki tók níggju bátar, sum stóðu í Pollinum í Sumba**

BRIM
*Áki Bertholdsen*

**Sumba:** Mánadagin var sjáldsama ringt veður um alt landið, ikki minst, tá ið hugsað verður um, at álmanakkin fortelur okkum, at nú er hásummar.

Eisini sumbingar vórðu tiknir fullkomiliga á bóli og har var brimið so nógv, sum ongin kennir til hesa árstíðina, tí tað var sum ringasta vetrarbrim

Sum flest aðrastaðni hava nógvir sumbingar drigið sær bátin oman, nú tað sumrar og nú brimið brast á, stóðu níggju bátar á dráttinum í Pollinum, sum lendingin har nevnist.

Tí máttu menn av húsum mánakvøldið at royna at bjarga bátunum, so at teir ikki allir skuldi farast í briminum.

Tað eydnaðist eisini at bjarga bátunum, men tað var í evstu løtu, tí brimið bara versnaði og bara eitt korter aftaná at seinasti báturin var drigin niðan frá, var brimið so nógv, at ongin hevði staðið. Sumbingar siga, at brimið var so nógv, at hóast teir drógu bátarnar heilt niðan undir vegin, kom brimið kortini næstan niðan á teir.

Sumbingar eru eisini í ferð við at stoypa bakkaverju, men eisini tað arbeiðið var fyri bakkasti av briminum.

Teir høvdu fylt formarnar mánamorgunin og brimið fór ikki við formunum, tí tað leikaði ikki heilt so hart á akkurat har, sum tað gjørdi í Pollinum. Men alt var fylt upp aftanfyri formarnar og okkurt var brotnað kortini. Alt, teir høvdu grivið út fyri bakkaverjuni víðari fram, fyltist eisini og má gravast útaftur av nýggjum, talan er um eina 100 metrar siga sumbingar, so teir noyðast at gera nógv arbeiði umaftur.



*Mánakvøldið máttu sumbingar draga bátarnar langt niðan ímóti vegnum undan briminum, men tað var í evstu løtu, at tað eydnaðist at bjarga teimum*